## DAGSINS MEINING

# List og mentan í føgrum skrúð

Føroysk list og mentan hevur nógv at vísa og at bjóða fram. Tað síggja vit á tí stóru listastevnuni, sum fór úr barkastokki leygardagin, og sum siglir fyri fullum seglum í tvær vikur kring oyggjarnar, men sjálvandi fyrst og fremst á høvuðsstaðarleiðini.

Listastevnan tykist væl fyrireikað og væl fyriskipað, men vit skulu hava í huga, at hetta er ein verkætlan fyri milliónir, og at fólk hava arbeitt við hesi ætlan í fullum starvi í heilt ár ella so. Tí er kravið eisini, at verkætlanin er professionell, og at hon er nakað fyri allar aldursbólkar, og at allir tættir innan list og mentan eru umboðaðir.

Spurningurin at stuðla mentan og list verður ofta umrøddur, tí summi halda, at almennur peningur skal sum minst brúkast til mentan og mentanartiltøk. Men tættir, sýningar ella konsertir á listastevnuni eru dømi um, hvussu nógv kann fáast burtur úr at stuðla mentan og hjúkla um tær ungu nálirnar, sum koma undan her á klettunum.

Høvdu vit t.d. ikki havt musikkskúlan kring landið, hevði tónleikalívið verið nógv fátækari bæði á bygd og í bý. Hann er bara ein møguleiki. Tann nógv umrøddi listaskúlin má nú av álvara fáast upp á beinini, soleiðis at vit eisini í størri mun kunnu hjálpa ungum eg eldri spírum longur ávegis.

Hetta er ein partur av mentapolitikkinum. Tí er tað skeivt, tá sagt verður, at vit hava ikki nakran mentanarpolitikk. Men spurningurin er altíð, hvussu stóra játtan kann mentan og list fáa á fíggjarlógini, tí vit vita, at fíggjarliga tilfeingið er avmarkað. Og vit kundu altíð ynskt, at t.d. sjónleikur, sum eisini er í fagrasta blóma, fekk meiri.

Tað sama ger seg eisini galdandi fyri søvnini, ikki minst søvnini kring landið, sum óivað kundu fingið meiri og størri hjálp, so tey vórðu betur skipað og vóru fleiri í tali, tí tey vísa jú ta lokalu søguna á landi og á sjógvi. Men í hesum døgum fegnast vit um, at vit hava fingið nógvar gamlar gripir heim, fyrst og fremst Kirkjubøarstólanar, sum í hesum døgum verða sýndir fram á Fornminnissavninum í Hoyvík.

Tá alt hetta er sagt, skal spurnartekin setast við, um tað er rætt at brúka so nógvan pening til eitt slíkt og so stórt tiltak, sum listastevnan er? Ella um ein partur av peninginum heldur skuldi farið til sjálva listina, samstundis sum stevnan kanska var minni í vavi og bara var løgd í eina viku, so hon var meiri savnað? Onkur kann fáa tann tanka, at stevnan verður eitt endamál í sjálvum sær.

Men henda viðmerkingin skal ikki taka nakað frá tí glæsiligu stevnuni, sum bæði vísir føroyska list og mentan, eins og vit eisini fáa ein útlendskan ráka at kenna. Vit ynskja tí tillukku og vóna, at tiltøkini verða væl vitjað, so sigast kann, at stevnan eisini verður væl eydnað.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til oddagrein í Dimmalætting 31. juli 2002

**Jógvan Jacobsen á Ryggi**
*í Nólsoy 31. juli 2002.*

Í oddagreinini í Dimmalætting mikudagin 31. juli 2002 verður roynt at heingja Tórbjørn Jacobsen fyri fortíðina hjá ávísum politikkarum hjá Fólkaflokkinum. Hetta er eitt aftursvar til hesa oddagrein.

Í hesi oddagrein stendur beinleiðis endurgivið: »Enn einaferð fekk bragdligi skiparin eina leiðbeining ið hvussu politikkur virkar í Føroyum…« Skrivarin letur til at halda føroyskan politikk vera nakað øgiligt, sum ein persónur sum Tórbjørn Jacobsen ikki klárar at skilja. Eg fari her at royna at gera eina mynd av hvussu føroyskur politikkur virkar, fyri síðani at samanbera hetta við arbeiðslagið hjá Tobba.

Edmund Joensen var eina tíð okkara løgmaður, hann misbrúkti nógv sínar heimildir sum løgmaður við hóttanum um at siga landsstýrismenn úr starvi. Hann kláraði til dømis at reka Jóannes Eidesgaard á dyr.

Eitt annað, sum Edmund kláraði at gera í síni tíð sum løgmaður, var at geva einum landsstýrismanni sekkin eftir donskum harraboðum. Danir ynsktu ikki, at føroyingar skuldu fáa ein undirsjóvartunnil, og tí var fólkaræðið sett til viks. Eitt fínt dømi um hvussu politikkur virkar í Føroyum.

Edmund kláraði eisini at skriva nývál út í úrtíð. Við tí gerðini gjørdi Edmund eitt øgiligt rumbul, sum eingin føroyingur hevur klárað at gjørt honum eftir síðani, uttan kanska Anfinn Kalsberg, tá hann avlýsti fólkaatkøvðuna.

Jóannes Eidesgaard hevur umboðað Føroyaland á danatingi. Sigast má, at maðurin hevur verið øgiligur, meðan hann hevur sitið og umboða okkum í øðrum landi, gjørdi ikki peningsverk og fekk eina fúla løn afturfyri. Føroyskur politikkur, tá hann er best. Í hvussu so er føroyskur javnaðarpolitikkur.

Jóannes Eidesgaard hevur eisini klárað at samanborið ein niðurskurð í einari útlendskari peningaveiting til Føroya við krystalnáttina í Hitlertýsklandi. Henda viðmerking fekk ongar avleiðingar uttan at fullveldisfólk talaðu at í til dømis lesarabrøvum. Atli Hansen í Sambandsflokkinum brúkti eisini hesa somu samanbering og hetta fekk heldur ongar avleiðingar.

Jóannes Eidesgaard hevur eisini lagt eftir veljarum hjá bæði Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum. Eftir ábreiðslu frá Høgna Hoydal hevði javnaðarhøvdingin einki annað at siga, uttan »jeg havi einki, at umskylda meg við, og jeg havi einki at umskylda meg fyri«. Heldur ikki hesuferð slapp Jóannes Eidesgaard at merkja nakrar avleiðingar. Føroyskur politikkur…

Eg kann til dømis nevna Óla Breckmann. Tað skuldi ikki verið neyðugt, at drigið nakað fram um hann. Men hann er eitt fínt dømi um hvussu politikkur virkar í Føroyum.

Vit havba fingið prógv um at ein og hvør er ikki vælkomin í Javnaðarflokkin. Ein atkvøðuslúkari úr Sjálvstýrisflokkinum royndi at koma upp í part, men tað var ikki eiti á hvussu illa hon var viðfarin av javnaðarfólki.

Vit hava eisini sæð Sambandsflokkin koma út við tí boðskapi, at hin sonevndi ríkisfelagsskapurin eigur lívið í okkum. Hetta er umleið tann fúlasta lygnin, sum undirritaði nakrantíð hevur hoyrt, men at lúgva soleiðis fyri Føroya fólki fekk heldur ongan avleiðingar.

Vit kunnu útfrá hesum brotum í føroyskum politikki tey seinastu árini staðfesta at politikkur í Føroyum ikki er serliga fyrimyndarligur. Fúlar lygnir, ærumeiðing og trakkan á føroyskt fólkaræði. Og hetta er bert eitt lítið brot úr føroyskum politikki.

Dimmalætting leggur eftir Tórbirni Jacobsen fyri ikki at fylgja óskrivnu reglunum í føroyskum politikki. Men í veruleikanum skuldi hann kanska fingið eina medalju fyri ikki at gera tað. Tórbjørn Jacobsen brýtur reglurnar og vil hava sannleikan fram fyri fólkið og harvið føroyingin við í føroyskan politikk.

Men sjálvandi hava fólk rætt til ikki at dáma arbeiðslagið hjá Tobba. Maðurin er jú ikki perfektur. Men tað virkar sum fólk seta nøkur øgilig krøv til mannin og tjóðveldis- og fullveldisfólk sum heild. Meira rættvíst var, um fólk og fjølmiðlar settu somu krøv til allar politikarar, ikki bara til Tobba, tjóðveldisfólk og fullveldisfólk.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Gud, Darwin og fosturtøka

**John Johannesen**

**Svar til greinina hjá Mariu Mørkøre, ið var í Fregnum 14-20/6-2002**

Maria Mørkøre skrivar í grein síni um munin á sjónarmiðinum hjá kristindóminum og humanismuni (ikki-religiøsari hugsan) viðvíkjandi morali, serliga fosturtøku. Hon vil vera við, at menningarlæran (evolutónsteoriin) hjá Darwin, um at »tann sterkasti yvirlivir«, gevir rættin til tann sterka og tí loyvir okkum at drepa børn, tí at vit hava maktina til tað. Og ikki bert tað: Darwinisma stuðlar kríggj, morð – ja hitlerfasisman sær út til at vera ein beinleðis avleiðing av útviklingstrúnni, heldur Maria.

Í mótsetning til henda ónda, náðileysa moralin stendur kristindómurin, ið stendur fyri náði, ábyrgd og vælgerð, sigur hon.

Eg havi nakrar viðmerkingar til hetta.

### Hvat er Darwinisma?

Darwin segði ongantíð at »tann sterkasti yvirlivir«. Tann, sum sigur tað, kennir hvørki til Darwin ella enska málið. »Survival of the fittest« merkir »tann best egnaði yvirlivir«. Og hetta er ikki at siga tað sama sum gamla orðafellið, at »tann stóri fiskurin etur tann lítla fiskin«. Tað hevði neyvan gjørt Darwin víða gitnan.

Nei, eygleiðingin hjá Darwin var tann, at ein samanhangur tykist at vera millum djórini, ið liva á einum staði, og staðið sjálvt. Á ferðum sínum á Galapagos-oyggjunum sá Darwin m.a., at 13 sløg av finkum livdu har. Hann sá eisini, at tær vóru ógvuliga ymiskar frá oyggj til oyggj, alt eftir hvør matur var at finna har. Á einari oyggj sá hann t.d. at allar finkurnar høvdu long nev. Tað vísti seg skjótt at á júst tí oynni var ógvuliga lítið av teimum kornunum, sum finkurnar vanliga eta. Tó vóru maðkar at finna inni í trøum, undur børkini, ið tær finkurnar við longum nevi kundu sleppa at. Tí var tað júst hesar finkurnar, ið yvirlivdu og fingu avkom. Avkomið arvaði langa nevið, o.s.fr.

Sum tað sæst frá hesum dømi eru nógvir aðrir mátar at vera »best egnaður« enn vera sterkur. Onnur dømi kundu verið, at ein lítil gravhundur kann klára seg betur enn ein stórur úlvur, um einasti maturin á staðnum finnist í holum undir jørðini - ella at vit eru um at útrudda djór, sum úlvar o.o., meðan rottur ikki eru at sleppa av við, tí at tær duga so væl at tilpassa seg.

Náttúrligir fyrimunir kunnu vera so nógv annað enn styrki og egoisma. Dádýr eru so bangin av sær, at tey minna um umvandrandi nervøs samanbrot. Men hesin sami ótti og nervøsitetur ger, at tey ansa eftir og eru á varðhaldi, meðan meiri sjálvsikkur djór verða etin.

Já, sjálvt kærleiki kann vera ein biologiskur fyrimunur. Vit kenna nógv dømi um hvussu djór, ið hjálpa hvørjum øðrum við at veiða, ið reinsa, mata og verja hvør annan, ansa eftir ungunum hvør hjá øðrum, o.s.fr., hava góða eydnu, meðan onnur, meiri sjálvsøkin djór hava óeydnu.

Soleiðis forklárar Darwin at vit finna hundaslagið chihuahua í tí steikjandi hitanum í Mexico, og sanktbernardshundar í fjøllunum í Scweiz, og ikki umvent. Tann best egnaði yvirlivir – HAR. Ein er ikki egnaður í nækrum universellum høpi. Tað er tengt at staðnum.

### Hvat er Darwinisma ikki?

Nei, tann sterkasti og brutali nýtist ikki at yvirliva, men hóast Maria Mørkøre hevði havt rætt í pástandi sínum, so hevði hetta kortini ikki merkt at Darwinisma hevði nakað vid nazismu, morð ella fosturtøku at gera.

Tí at menningarlæran hjá Darwin hoyrir inn undir biologi – ikki moralfilosofi. At lýsa hvussu náttúran er, er ikki tað sama sum at siga hvussu menniskju eiga at bera seg at. Vit vita at djór neyðtaka hvønnannan og eta síni børn, men menniskju vita at hetta er skeivt.

Náttúran ER ofta náðileys og »ónd«. Darwin sá hetta meiri enn tey flestu í kraft av arbeiði sínum, og hann misti trúnna á Gud av hesum: »Eg fái meg ikki at trúgva at ein góður og almáttugur Gudur við vilja skal hava skapað Ichneumonidae (parasittvespur) við tí miðvísu ætlan, at tær skuldu eta livandi (summarfugla-)larvur innanífrá«.

Men Darwin misti ikki sína góðsku av hesum. Tá ið vit lesa um Darwin sum persón, so síggja vit eitt lítillátið, milt og umhugsunarsamt menniskja. Darwin var giftur við einari sera gudiligari (kristnari) konu, og hann bíðaði leingi við at útgeva bók sína »The Origin of the Species«, tí at hann hugsaði um hvussu tað fór at raka hana.

Tá ið hann kom aftur til Onglands av kanningarferð síni og útgav ferðafrásøguna, kundu fólk lesa hvussu skelkaður og mótfallin hann var av at ræðuleikarnir, ið hann hevði sæð í Suðuramerika, kundu í einum kristnum samfelagi.

Lívfrøðingurin A.E. Wilder Smith, ein vinur hjá Darwin, hevur greitt frá hvussu hugtikin hann gjørdist av Darwin, eftir at hann sá hann gevast heilt við at skjóta fugl, ið annars var hansara størsta ungdómsítriv, eftir at hann einaferð hevði funnið ein særdan fugl.

»Kærleiki til allar livandi skapningar er menniskjans tignarligasti eginleiki«, er Darwin kendur fyri at hava sagt. Darwin gjørdist vegetarur. Hann var so góður við djór, at hann kundi ikki fáa seg at drepa tey av berari matgleði. Sjálvt dissektion, ið lá hansara arbeiði so nær, píndi hann. Spurdur um tað í 1871 svaraði Darwin: »Eg viðgangi at tað kann forsvarast í samband við álvarsamar fysiologiskar kanningar; men ikki um tað verður framt av forbannaðum, andstyggiligum forvitni. Hetta evnið ger meg sjúkan av andstygd, so eg vil ikki siga eitt orð afturat um tað, annars fái eg ikki sovið í nátt«.

Ja, náttúran ER ónd, men er tað Darwinsa skyld? Sambært Mariu Mørkøre er tað jú hennara gudur, ið hevur skapað tað, ikki so? Darwin gjørdi ikki annað enn at eygleiða, lýsa og forklára, sum allir vísindamenn.

Er tað ikki láturligt at Maria skal nýta tann bíbilska gudin sum eitt dømi um ein, ið er ímóti fosturtøku og verjir heilagleikan hjá øllum lívi, tá ið hann meiri enn einaferð hevur dripið smábørn og onnur í hópatalið (t.d. í flóðini miklu)?

Og at hon skal demonisera Darwin, hvørs náði rakk so nógv longri – sjálvt til ómælandi djór?

### Fosturtøka

Fosturtøka er eitt torført evnið. Maria Mørkøre ger ein feil, tá ið hon roynir at gera tað so einfalt, sum at humanisman sympatiserar við tí, meðan kristindómurin er ímóti. Eg kenni nógv ikki-religiøs menniskju, ið eru ímóti fosturtøku. Ein nýtist ikki at trúgva uppá sálir, Gud ella nakað annað yvirnáttúrligt fyri at síggja, at fosturtøka er tætt við manndráp.

Men tað er ikki rætt, sum Maria sigur, at eitt egg er eitt menniskja í teirri løtu tað er gitið. Tad er sum at peika eftir einum sinopskorni og kalla tað fyri eitt træ. Tað er enn bert ein celluhópur, og kann innan 14 dagar gerast til 2, 3, ella fleiri børn, um tað deilir seg - alt tengt av tilvild.

Men eitt fostur er eitt potentielt menniskja. Spurningurin er, um tað er ein relevantur moralskur faktorur. Tí vil tað so ikki siga, at vit hava eina moralska plikt at fáa so nógv børn sum yvirhøvur møguligt? Tað munnu fá halda.

Harafturímóti eru tvey ógvuliga góð argumentir fyri at fosturtøka í ávísum umstøðum er í lagi. Tey eru bæði tengd at tí vísindaliga veruleika, at heilabarkin ikki fyrr enn 18. -25. viku er so útviklaður, at forbindilsi er millum synapsurnar. T.v.s. at tey signalini, ið hjá vaksnum fólki elva til pínu, ongantíð verða móttikin. Og tilvitandi gerst tað ikki fyrr enn nógv seinni.

Hesi tvey tingini - at kunna hugsa (vilja) og føla - eru tað, ið skilja tilvitandi verur frá plantum og mineralum, og ger tey moralskt týdningarmikil. Vit hava ikki moralskar ábyrgdir fyri steinum og grasi. Tey hava ikki ein egnan vilja, ið vit kunnu taka frá teimum, og tí kunnu vit ikki forbróta okkum (t.e. fremja brotsverk) móti teimum. Ei heldur kunnu tey føla nakað, so einhvør samkensla fyri teimum er misskilt.

Og kann eitt fostur hvørki føla, hugsa ella vilja nakað, so er ringt at síggja hví vit skulu hava moralskar ábyrgdir fyri tí.

Men fosturtøka ER ein torførur spurningur. Eg veit enn ikki við vissu hvat eg skal halda. Og Maria veit í øllum førum ikki hvat Darwin heldur.

# Mr. Big – samfelagsrevsari í Havn

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*



Eg havi sum samfelagsrevsari allan rættin uppá mína síðu, tá ið ein heldur seg innan fyri galdandi lóg og rætt og landaskil og politiviðtøku fyri Tórshavn. Eg havi ikki gloymt alt tað, ið hevur merkt tað dagliga gerandislívið, ein hevur greitt í túsundtals lesarabrøvum í bløðunum, so støðan er greiðari í dag.

Mr. Big – samfelagsrevsari í Havn.

Eg havi altíð verið fyri diskriminering av teimum, ið persónliga høvdu at einum innan bløðini, útvarp, sjónvarp og úti í frítíðar- og ítróttarfelagsskapum.

Eg havi ongantíð áður verði tikin í nóg stórum álvara fyrr enn ein framdi eina røð av persóns avdúkingum í túsundtals lesarabrøvum í bløðunum.

Eg havi ikki áður kunna livað og virkað sjálvstøðugt í Havnini fyrr enn eftir eina røð av persóns avdúkingum, ið opnaði eyguni á arvafíggindum.

Eg havi verið erligur, rættvísur og opin yvir fyri øllum, tá ið ein hevur greitt munin á bygdar-, havnar- og fremmandafólki, ið ein hittir í Havnini.

Eg havi fingið kunnað um grundleggjandi skeivleikar og órættvísi í øllum etableraðum lívsviðurskiftum, ið eru avskeplað og kappingaravlagað.

Eg havi ongantíð dult, at ein vil skunda undir skipan av einum meiri rættvísum samfelagsbýti ímillum høg og lág í samfelags høpi kring alt landið.

Eg havi fingið sett ein hóp av vinnuligum virksemi í gongd vanligir føroyingar hava tikið til sín frá túsundtals lesarabrøvum í bløðunum.

Eg havi fingið viðgongd hvørs øll stíðsmál frá ’79 vinna almennan og politiskan frama, og hvat ein dagliga tekst við í tí dagliga lívinum.

Eg vil hava demokrati/-decentralisering/fólkaræði/stýri/bygdar/býar/økismenning/útjaðarapolitik.